umhvørvisstovan

## Tíðaravmarkað
# Umhvørvisgóðkenning

| Navn á virki við góðkenning: | |
|---|---|
| IRF | |
| Bústaður hjá virki: | |
| Í grótbrotinum Úti í Vík í Skarðshaga í Leirvík | |
| Galdandi fyri virksemi: | |
| Goymsla til innballað burturkast | |
| Matr. nr.: | V-tal: |
| 429 | 353477 |
| Mál nr.: | Galdandi frá: |
| 17/00490-6 | 1.november 2017- 1. apríl 2020 |

Argir, hin 1. november 2017

Suni Petersen, deildarleiðari

/

Heidi S. Mortensen, umhvørvisviðgeri

# Innihaldsyvirlit

1. Góðkenning og heimildir ... 3
2. Umsóknin ... 3
3. Lýsing av virkseminum ... 3
4. Málsviðgerð ... 4
5. Góðkenningartreytir ... 4
   5.1. Almennar treytir ... 4
   5.2. Innrætting og rakstur ... 4
   5.3. Omanávatn og spillivatn ... 5
   5.4. Luft og luktur ... 5
   5.5. Óljóð, ristingar, geislingar og ljós ... 5
   5.6. Óhapp ... 6
   5.7. Skráseting ... 6
6. Kæruvegleiðing ... 7

# 1. Góðkenning og heimildir

Henda umhvørvisgóðkenning av goymsluplássi hjá IRF til innballað burturkast í grótbrotinum Úti á Vík, á matr. nr.429 í Skarðshaga í Leirvík, er givin við heimild í § 29 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, og § 1, nr. 4 í kunngerð nr. 54 frá 3. mai 1994 um at leggja eftirlits- og umsitingaruppgávur eftir umhvørvisverndarlógini til Umhvørvisstovuna, við seinni broytingum.

Virki, sum goyma, varðveita ella viðgerða burturkast eru í bólki G í fylgiskjalinum til lógina, og skulu tí hava umhvørvisgóðkenning, sambært kap. 5 í lógini.

Endamálið við umhvørvisgóðkenningini er at fyribyrgja og avmarka dálking av náttúru og umhvørvi og at fyribyrgja og avmarka heilsuskaðar og ampar, sum kunnu standast av virkseminum.

# 2. Umsóknin

Umhvørvisstovan fekk tann 21. august 2017 umsókn um umhvørvisgóðkenning av goymsluplássi til burturkast í grótbrotinum Úti í Vík í Leirvík. Saman við umsóknini hevur umhvørvisstovan móttikið støðumynd, tvørskurðsmynd og upplýsingar um reinsing av omanávatninum frá plássinum. Í umsóknini er upplýst, at neyðugt er at brúka goymsluplássið fram til 1. Januar 2020.

# 3. Lýsing av virkseminum

Grótbrotið er staðsett á matr. nr. 429 í Skarðhaga Úti í Vík í Leirvík, umleið 1 km frá brennistøðini á Hagaleiti.

Av tí, at ketilin á brennistøðin skal skiftast, er neyðugt at brennistøðin liggur still í umleið 10 vikur, frá umleið hálvum februar til síðst í apríl 2018. Hetta ger tað neyðugt hjá IRF at balla burturkastið, og koyra tað á goymslu inntil brennistøðin verður tikin í nýtslu aftur.

Grótbrotið verður í løtuni nýtt sum goymslupláss til timbur, ið skal brennast. Eftir ætlan verður timbrið ballað fyrst, tí náast kann ikki at brenna alt timbrið innan brennistøðin verður løgd still, og má tað tí eisini goymast. Alt annað burturkast, ið skal brennast, so sum húsarhaldsburturkast, verður frá november 2017 ballað við brennistøðina, og síðani flutt á goymsluna.

Nøgdin av burturkasti, sum væntandi skal á goymslu hetta tíðarskeið, er umleið 4.400 tons, ið svarar til umleið 6.000 ballur á 700 kg. IRF væntar, at tað fer at taka umleið hálvt annað ár at brenna alt burturkastið, og fer tí at brúka goymsluna fram til 1. Januar 2020.

# 4. Málsviðgerð

Í málsviðgerðini er serligur dentur lagdur á:

- at umhvørvisdálkandi evni ikki verða leidd út í umhvørvið,
- at reinsiskipanir eru undir regluligum eftirliti,
- at vandin fyri óhappum, sum kunnu hava dálking við sær, skal minkast mest møguligt,
- At vandin fyri eldi avmarkast mest møguligt
- At goymslan ikki elvir til ampa av lukti, dusti, rottu ella øðrum skaðadjórum

Uppskot til umhvørvisgóðkenning varð sent til IRF og Leirvíkar kommunu til viðmerkingar tann 5. oktober 2017. IRF hevði tvær viðmerkingar til uppskotið. Tann fyrsta viðmerkingin var um nøgdina av burturkasti, sum væntandi fer at liggja á goymslu. Her viðmerkti IRF, at upplýsta nøgd er ein meting, men at nøgdin møguliga verður eitt sindur hægri. Hettar kann Umhvørvisstovan ganga við til, treytað av, at tað er umhvørvisliga og trygdarliga forsvarligt. Hin viðmerkingin var um, nær ballingin av burturkasti byrjar. Upprunaliga var ætlanin at ballingin av burturkastinum skuldi byrja í februar 2018. Men av tí, at brennistøðin hevur havt teknisk brek við ketlinum, ið nú skal skiftast út, nær IRF ikki at brenna alt burturkast innan brennistøðin verður løgd still. Tískil byrjar ballingin í november 2017. Hetta kann Umhvørvisstovan ganga við til.
Kommunan hevði ongar viðmerkingar til uppskotið.

# 5. Góðkenningartreytir

## 5.1. Almennar treytir

5.1.1. Henda umhvørvisgóðkenning, við møguligum broytingum og dagføringum, skal altíð finnast á virkinum, og skulu øll viðkomandi starvsfólk kenna innihaldið og krøvini í góðkenningini.

5.1.2. Allar sýnistøkur og kanningar v.m. sum verða kravdar í umhvørvisgóðkenningini, skulu gerast av óheftum stovni ella felga, sum hevur førleika og útgerð at gera arbeiðið.

5.1.3. IRF rindar fyri allar sýnistøkur, kanningar og metingar av úrslitum.

5.1.4. Umhvørvisstovan hevur eftirlit við virkinum. Eftirlitið verður útint sambært kap. 7 í umhvørvisverndarlógini.

5.1.5. Henda góðkenning tekur ikki støðu til, um tað er neyðugt við góðkenning eftir aðrari lóg.

## 5.2. Innrætting og rakstur

5.2.1. Alt øki skal vera girt inni við 2 metra høgum hegni.

5.2.2. Økið skal vera læst fyri óviðkomandi, og skeltast skal, at óviðkomandi onga atgongd hava.

5.2.3. Økið skal verða mannað, tá opið er.

5.2.4. Tiltøk mugu setast verk at tryggja, at eldur ikki kemur í burturkasti í grótbrotinum. Videoeftirlit og vaktarhald eru partar av eftiransing, umframt at brunaumsjónarmaðurin í kommununi metir um hvørji tiltøk skulu setast í verk.

5.2.5. Daglig upprudding skal vera á plássinum, og skaddar ballur skulu takast av plássinum beinanvegin.

5.2.6. At basa rottum skulu rottufellur og eitur setast upp inni á plássinum og regluligt eftirlit vera við teimum.

5.2.7. Burturkast kann í mesta lagi liggja á plássinum fram til 1. januar 2020.

5.2.8. Umhvørvisstovan skal hava boð umleið 1 mánað innan tað síðsta burturkastið er farið av økinum, har IRF skal upplýsa hvussu økið verður ruddað og avriggað.

**5.3. Omanávatn og spillivatn**

5.3.1. Einki vatn frá økinum rundanum má renna inn á plássið.

5.3.2. Alt vatn frá øllum økinum skal leiðast gjøgnum hóskandi reinsiskipan, so sum oljuútskiljara við sandfangi.

5.3.3. Dekkið á øllum plássinum skal vera stoypt ella asfalterað og hava eitt ávíst hall, so vatn kann renna frá økinum í reinsiskipanina.

5.3.4. Oljuútskiljarin skal hava sjálvvirkandi flotlæsara og ávaringarskipan, ið boðar frá, tá ið hann skal tømast.

5.3.5. Oljuútskiljarin skal tømast eftir tørvi, tó í minsta lagi tvær ferðir um árið.

5.3.6. Sýnistøkubrunnur, ið gerð tað møguligt at taka sýni av spillivatninum, skal vera eftir at spillivatnið er reinsað.

5.3.7. Um mett neyðugt, skulu sýnir takast av spillivatninum úr sýnistøkubrunninum. Sýnistøkan verður tá gjørd í samráð við Umhvørvisstovuna.

5.3.8. Einki spillivatn má bera brá av olju ella aðrari dálking.

5.3.9. Alt spillvatn skal tað leiðast út á sjógv, har rákið førir spillvatnið úr landi, har vatnskiftið áhaldandi er so stórt, at útleiðingar hvørki elva til uppsavnan av evnum og tilfari, til slóðir í sjónum ella til aðrar broytingar í umhvørvinum. Munnin á spillvatnsútleiðingini skal í minsta lagi verða 1 metur undir størstu fjøru.

**5.4. Luft og luktur**

5.4.1. Virksemið má ikki hava við sær ampar av lukti, dusti ella royki uttan fyri øki virkisins.

5.4.2. Um ampar vera av lukti, dusti ella øðrum, skulu neyðug tiltøk setast í verk.

**5.5. Óljóð, ristingar, geislingar og ljós**

5.5.1. Alt virksemið skal fara fram soleiðis, at tað minst møguligan mun hevur við sær ampar av óljóði, ristingum, ljósi ella geislingum uttan fyri øki virkinsins.

5.5.2. Ískoytið frá virkseminum til óljóðið við næsta grannamark má ikki fara upp um virðini í talvu 2.

Talva 2: Markvirðir fyri óljóð – db(A)

| Dagur | Klokkutíð | Øki 1 dB(A) | Øki 2 dB(A) | Øki 3 dB(A) | Øki 4 dB(A) |
|---|---|---|---|---|---|
| Mánadag til fríggjadag | 07-18 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Mánadag til fríggjadag | 18-22 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Leygardag | 07-14 | 70 | 60 | 55 | 45 |
| Leygardag | 14-22 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Sunnu- og halgidagar | 07-18 | 70 | 60 | 45 | 40 |
| Allar dagar | 22-07 | 70 | 60 | 40 | 35 |

Øki 1: Vinnuøki, har larmandi virksemi kann fara fram
Øki 2: Vinnuøki, har minni larmandi virksemi kann fara fram
Øki 3: Blandað bústaðar- og Miðstaðarøki
Øki 4: Bústaðarøki

5.5.3. Um ampar verða av óljóði, ristingum ella ljósi, skulu neyðug tiltøk setast í verk til eitt støði, ið Umhvørvisstovan kann góðtaka.

## 5.6. Óhapp

5.6.1. Henda óhapp, skulu tiltøk beinanvegin setast í verk til at avmarka møguligar fylgjur og at taka dálkandi tilfar upp.

5.6.2. Umhvørvisstovan skal skjótast gjørligt hava boð um óhapp, sum hava brádliga økta dálking við sær[1]. Eisini skal ein frágreiðing um orsøk, tiltøk til at basa og taka upp eftir bráðfeingis dálking og tiltøk, sum eru sett í verk fyri at tryggja, at líknandi óhapp ikki kemur fyri aftur, sendast Umhvørvisstovuni.

## 5.7. Skráseting

5.7.1. IRF skal skráseta nøgdina av burtukasti, ið verður ballað og goymt á bingjuplássinum. Eisini skal IRF skráseta tá reinsiskipanin verður tømd, og onnur viðurskiftir av umhvørvisligum týdningi.

5.7.2. Skrásetingar skulu til eina og hvørja tíð kunna síggjast av eftirlitsmyndugleikanum og skulu goymast í minsta lagi í 5 ár.

[1] Um dálkingaróhapp førir til, at dálkandi evni fer út um virkisøkið, skal í minsta lagi løgreglan og møguliga MRCC (um olja fer á sjógv) hava boð um tað.

# 6. Kæruvegleiðing

Henda avgerð kann, sambært § 66 í løgtingslóg nr. 134 frá 29. oktober 1988, um umhvørvisvernd, við seinni broytingum, kærast til landsstýrismannin við umhvørvismálum. Kæran skal sendast Umhvørvisstovuni, sum síðan sendir hana til landsstýrismannin við neyðugum skjølum. Kærufreistin er 4 vikur frá tí degi, umhvørvisgóðkenningin er almannakunngjørd. Um kærufreistin er úti ein leygardag ella ein halgidag, verður kærufreistin longd til tann fyrstkomandi gerandisdagin.

Avrit: Eystur kommuna, Kulibakki 8, FO-520 Leirvík
Landslæknin, Sigmundargøta 5, Postrúm 9, FO-110 Tórshavn.